Eftir Maurentius Viðstein



M. S. Viðstein (1892 — 1971)

naggatódn kom í, tá arbeiðsmannafelagið varð stovnað. — Men nú var alt so spjatt, at vont var at skipa henda felagsskap av nýggjum. Jóan Petur var heima á Sandi, Chr. Skylv Hansen í London, og í Sjálvstýrisflokkinum vóru menn, ið andøvdu ímóti teim sosialistisku hugsjónunum, so her var lítið at gera. — Teir 50 limirnir, sum »Tjakfelagið hevði, tá ið talið var hægst, vóru ikki allir líka tøkir til at fáa at byrja aftur av nýggjum. — Hans Nielsen ferðaðist eitt sindur um landið og helt nakrar fundir hesa vikuna, sum hann var í Føroyum.

Tá ið hann var farin, gingu menn, yngri og eldri, á M. S. Viðstein, til at fáa stovnað eitt sosialistiskt felag. Hetta var gjørt av 17 limum, sum møttir vóru á fundi í Tinganesi — ella niðri í Havn — á skrivstovuni hjá A. W. Skibsted, sum arbeiðsmannafelagið hevði leigað til at halda nevndarfundir í. Hetta var í 1925. Um leið 10 mánaðir eftir varð felag eisini stovnað á Tvøroyri.

Í 1926 fall danska sosialdemokratiska stjórnin — og fólkatingsval varð útskrivað. Áheitan kom frá teim donsku sosialdemokratunum (Alsing Andersen) um at stilla formannin í sosialistiska felagnum í Havn, M. S. Viðstein, upp sum valevni til fólkatingið, sum »en foreløbig føler og styrkeprøve«, sum tað stóð í brævinum. Felagið í Havn samtykti á fundi at stilla formann felagsins upp, og tað fekk holla undirtøku á Tvøroyri. — Har komu sostatt at verða tríggir fólkatingskandidatar á hesum sinni: A. Samuelsen fyri Sambandið, M. S. Viðstein fyri Sosialdemokratarnar og J. H. O. Djurhuus, uttanflokka. Valúrslitið varð, at A. Samuelsen var valdur við 1700 atkvøðum, M. S. Viðstein fekk teprar 1200 atkvøður og Janus, skald 500.

Við valið til løgtingið komu teir fyrstu á ting fyri hesa nýggju politisku stevnu, teir vóru P. M. Dam, lærari og M. S. Viðstein, táverandi blaðstjóri á »Føroya Socialdemokrati«. M. S. Viðstein var tingmaður í 2 tingskeið, men so kom skilnaðurin, ið einaferð mátti koma, millum hann ið stóð til vinstru, og hin ið stóð høgrumegin. M. S. Viðstein, ið hevði verið formaður flokksins, gav hetta frá sær — og so var skilnaðurin fullfiggjaður.


Blaðið »Føroya Socialdemokratur« byrjaði útkomu sína í 1927 og M. S. Viðstein var fyrsti blaðstjóri, og hevði hetta starv í 6 ár, tá ið hann tók seg heilt burtur úr almennum politiskum starvi. — Tað dugdi honum lítið at taka upp eitt nýtt stríð, til tess var hann alt ov langt til vinstru fyri ta officiellu sosialdemokratisku áskoðan — og har kom hann at verða framvegis. — .

»Sosialurin« fyllir 25 ár:

Hevur skift navn tríggjar ferðir

Tó bar blaðið altíð eykanavnið:

SOSIALURIN hevur í ár 53 ár á baki, men hevur kortini ikki øll hesi árini borið sama navn. Frá 1927 og nøkur ár framyvir æt blaðið »Føroya Sosialdemokrat«, sum seinri varð broytt til tað meira føroyska navnið »Føroya Sosialdemokratur«. Hetta var navn blaðsins fram til 1955 — ella nærri at rokna 2. apríl — fyri 25 árum síðani — tá blaðið fekk núverandi navnið »SOSIALURIN«. Menn hildu at gamla navnið fall nakað tungt, og tá blaðið ikki hevði annað navn manna millum enn Sosialurin, var hildið at vera rímiligt at fremja hesa navnabroyting.




·FØROYA·
SOCIAL·DEMOKRAT
FRÆLSI JAVNAÐUR BRØÐURSKAPUR
Nr. 1. Tirsdag hin 24. mai 1927. 1. árg.

FÖROYA
SOSIAL-DEMOKRATUR
FRÆLSI JAVNAÐUR BRØÐURSKAPUR
Nr. 11 LEYGARDAGIN 12. MARS 1955 28. árg.

SOSIALURIN
NR. 16.
LEYGARDAG
16. APRIL 1955
FRÆLSI JAVNAÐUR BRØÐRALAG 28. ÁRG.

Frá blýggj til offsett

Sum rímuligt er, ber illa til at sammeta teir »sosialarnar«, sum t. d. komu út fyri 25 árum síðani við blaðið í dag. Útsjóndin er heilt ein onnur t. d. orsakað av teimum nógv broyttu prentingarmøguleikunum — fyrr við blýggjprenting og nú við offsett, sum gevur nógv størri møguleikar.

Blaðið kom í nógv ár bert út eina ferð um vikuna í fýra síðum, og hevur blaðið eisini hesi 53 árini, tað er útkomið, verið prentað á fleiri ymiskum prentsmiðjum. Umframt at blaðið fyri just 25 árum síðani skifti navn, hendi eisini ein onnur broyting. Frammanundan hevði blaðið tá verið prentað á prentsmiðjuni hjá Arnold Øster, men flutti tað tá niðan á Heygsbreyt. Á hesi prentsmiðju var blaðið so prentað í blýggi fram til 1974, tá lagt varð um til offsett-prent.

Hesi seinastu árini hevur blaðið verið gjørt greitt til prentingar á egnari prentsmiðju og verið prentað á Dimmalætting, eins og flestu onnur føroysku bløðini.

Politiskt málgagn — nútímans tíðindablað

Men tað er ikki bert innan teknikkin, at stórbroytingar eru farnar fram, blaðnum viðvíkjandi.

Vanligt var, at hvør flokkur skuldi hava sítt blað, og soleiðis var eisini við Javnaðarflokkinum.

Tað var Javnaðarflokkurin, sum stóð sum útgevari av blaðnum, og var blaðið somuleiðis floksins málgagn. Í tilfarinum í blaðnum var størsti dentur lagdur á tað politiska tilfarið, og sigast má, at dúgliga hevur blaðið roynt seg sum málgagn floksins í stríðnum fyri ti arbeiðandi fjøldini, í royndunum at skapa eitt betri samfelag, har pláss var fyri øllum. Hetta hevur ikki verið nakar »dansur á rósum« fyri teir menn og tær kvinnur, sum hava hildið lív í blaðnum gjøgnum øll hesi árini. Trupulleikarnir hava verið bæði nógvir og stórir — bæði figgjarliga og á annan hátt, men vunnið hevur verið á teimum. Eingin, sum fæst við politiskt virksemi, er vanur at fáa so mikið sum eina tøkk, men tað hevur heldur ikki verið av teirri orsøk, at undangongufólk okkara hava arbeitt. Tað var av eldhuga virkið, og uttan henda eldhuga og stríðsvilja kann eingin idealistisk hugsjón liva og sigra.

Nú kann ein kanska siga, at soleiðis var fyrr, og er ikki longur. Tað er bæði beint og skeivt. Nú fáa menn løn fyri at skriva og virka á blaðnum — tað var ókent tá. Her er hending farin fram til tað betra, men um blaðið ikki hevði eina so stóra fjøld av fólki kring landið aftanfyri seg, sum á so mangar ymiskar máta gera eitt stórt arbeiði blaðnum til frama, gjørdist einki.

Nú ein dagin ringdi ein gamal javnaðarmaður til okkara og helt fyri at hann kendi ikki blaðið aftur. Hetta var ikki longur eitt javnaðarblað, men eitt vanligt tíðindablað. Eitt gott tíðindablað legði hann afturat.

Nøggjur útgevari

Tað er einki at ivast í, at tað eru fleiri enn hesin eini javnaðarmaðurin, sum er av hesi áskoðan. Tað er beint, at Sosialurin í dag ber meira dám av einum tíðindablaði, enn av málgagni fyri ávisan flokk. Eisini er tað hent, at tað ikki longur er Føroya Javnaðarflokkur, sum stendur sum útgevari av blaðnum, men P/f Sosialurin.

At vit fyri nøkrum árum síðani løgdu á ein annan bógv tilfarsliga komst av, at vit vildu royna at skapa eitt so gott tíðindablað sum gjørligt. At tilfarið var so viðkomandi fyri so nógv sum gjørligt, objektivt, upplýsandi og debatskapandi. Hetta hevur eftir okkara hugsan eydnast rættiliga væl, og kunnu vit somuleiðis fegnast um, at Sosialurin í dag er Føroya næststørsta blað.

Viðvíkjandi ti politiska tilfarinum er at siga, at vit umframt at stremba okkum eftir at bera sakligan, fjøltáttaðan og grundigan tíðindaflutning, altíð vilja hava eitt vakið eyga fyri skeivleikum og órættvísi í okkara samfelagi, og vit vilja ikki vera bangnir fyri at tala at.